# BØNARLØTAN

**JANUAR** **2026** **41. árg.**

***Gloym ikki allar vælgerðir Hansara! Sálm. 103***

***1. Hósdagur*** ***5. Mós. 9.1-14***




## PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
## Carol og Poul Joensen

Sorimifólk í PNG fingu í farna ári NT á móðurmálinum. Carol og Poul hava síðani 1997 arbeitt ótroyttiliga við hesum. Við stuðli og bøn eiga føroyskar samkomur og einstaklingar sín lut í hesum verki. Minnist næmingarnar á skúlanum, at tey gera framstig í lestrinum, og at tey áhaldandi vaksa í náði og kunnleika um Harran. Biðið fyri okkum, starvsfólki, okkara ymisku ábyrgdum, og at vit eru góðar fyrimyndir og áhaldandi stuðla næmingunum.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 13, Evita 10, Joy 9**
1.-3. jan. hava vit bíbliutímar fyri børn, áðrenn skúlin byrjar aftur. Biðið fyri fyrireikingunum, og at nógv børn koma.

**KRINGVARPIÐ**

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Fríggjadagur* *5. Mós. 9.15-29*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**



Vit ynskja øllum eitt signað nýggjár og takka fyri forbønir og stuðul. Møtini sunnud. halda á allan jan. Fríggjakvøldssamkoman byrjar aftur 24. jan. Vit verða búgvandi í Kristnastovu fram til í summar. Biðið fyri verkinum í og út frá Kristnastovu.

## *3. Leygardagur* *Matt. 1.1-25*

**FØROYAR**
**Elin og Jógvan Jacobsen**



*Vissa* er byrjað nú í jan. Nógv ung eru við. Biðið, at Gud opnar hjørtuni. Kristianna J. Heinesen og Jógvan Jacobsen undirvísa. Eisini liggja

nógvar talur á appini *Lurta*. Í løtuni gjøgnumganga vit *Fylling Guds og sonn tilbiðjan.*

## ZAREPTA

Vetrarlegur, Suðuroy 9.-11., Lívdin 16.-18., Ebenezerkórið 23.-25., Betesda, ung, 30. jan.-1. feb.



**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *4. Sunnudagur* — *5. Mós. 10.1-22*

### Atlantic Mission

Vit fyrireika evangelisering í Danmark 24. juli - 4. aug. Nógv spennandi er á skránni. Fylgið okkum á instagram ella facebook, ella set teg í samband við okkum. Luttakaragjald er 2.500 kr + ferðaseðil. 17 til 30 ára aldursmark. Tilmelding er byrjað á atlanticmission@mail.fo, ella set teg í samband við Ruth Gaardlykke á 519090 ella Ólav Thomsen á 740303.

## *5. Mánadagur* — *Matt. 2.1-23*

### ONGLAND, Personal Support Matters
### Claire og Craig Niclasen
### Rebekah 17, Lydia 15



Biðið fyri venjingarskeiðnum, ið verður millum 7. jan. og 11. feb., og at luttakararnir verða til signing fyri mong. Eg, Claire, leiði arbeiðið, og málið er, at Gud verður dýrmettur.

Biðið fyri døtrum okkara, Rebekah og Lydiu, ið fyrireika seg til prótøkur og skulu taka avgerðir um framtíðina.

## *6. Týsdagur* *5. Mós. 11.1-17*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



Eg undirvísi ein ella tveir sunnudagar í jan. í einum bíbliuflokki í samkomuni, har vit vanliga koma. Eisini skal eg næstu tríggjar mán. tala á trimum serligum møtum, sum fleiri samkomur í Bullock County hava saman. Vit hava regluligt skrivligt samband við trúboðarar kring heimin. Vit vilja veita teimum hjálp og signing.

## *7. Mikudagur* *Matt. 3.1-17*

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**



Vit vóru í Føroyum í nov. Tað var signað at vera við til samfelagsstevnuna fyri fyrstu ferð í nógv ár. Tað er eisini gott at vera komin heim aftur eftir at hava ferðast í ymiskum londum seinastu tríggjar mán. Í jan. verða vit mest heima og halda á við tænastuni heimanífrá.

## *8. Hósdagur* *5. Mós. 11.18-32*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Biðið fyri tænastuni á netinum, STEVN, lærisveinaskapi, samtalum og møtum. Vit royna at náa inn í Pakistan gjøgnum netið og hava tørv á STEVN á pakistanskum máli, helst fleiri forrit til ymiskar bólkar, so vit kunnu fylgja upp. Gott hevði verið, um Shamila kundi arbeitt burturav við andaligari lívsvenjing (*life coaching*) í hesum høpi. STEVN er nú umsett til enskt, og vit fara at gera upptøkur av forritinum yviri í Pakistan. Andaliga mótstøðan er stór. Sjúka og vatnflóð hevur darvað arbeiðinum í Pakistan síðani aug.



**OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

## *9. Fríggjadagur* — *Matt. 4.1-25*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

Vit takka fyri samfelag, forbøn og umsorgan í 2025. Vit fara í næstum at tala út frá Jóh.ev. Biðið, at Harrin signar, og at fólk læra Jesus betur at kenna.

**FØROYAR**

- **Else og Poul Johan Djurhuus**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
- **Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

## *10. Leygardagur* *5. Mós. 12.1-16*



**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
12. jan. fara Súsanna og Guttorm Joensen úr Havn fyribils í tveir mánaðir við Logos Hope, hann í maskinrúminum, og hon skal hjálpa við ymiskum uppgávum, eitt nú tónleikafrálæru fyri børnum. Biðið um varðveitslu og vegleiðing, og at tey verða til signing fyri mong – bæði umborð og í landi. 18. jan. fer Elisabeth í Túni Nielsen av Toftum til *Off the Grid* í Nýsælandi við denti á persónliga og andaliga menning úti í náttúruni í 40 dagar uttan samband við onnur. Biðið fyri henni og fyri teimum, ið verða send á hennara leið, at Gud opnar hjørtu teirra til frelsu, og biðið fyri teimum, sum nú søkja Guds leiðslu at taka stigið í trúgv at fara út at tæna.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

*Í dag fyllir Joy Tuohy 9 ár

## *11. Sunnudagur* *Matt. 5.1-26*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Av tí at vit bæði seinastu tíðina hava verið í sjúkuviðgerð, Anne fyri knæið og eg fyri lunguni, minkar virksemið nógv í januar.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**



**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *12. Mánadagur* — *5. Mós. 12.17-32*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru sera takksom fyri allar bønirnar gjøgnum farna árið. Nógv fólk komu til tiltøkini í des. Biðið, at tað, sum varð sáað, gevur ávøkst, og at nógv venda sær til Guds og uppliva eitt nýtt lív í kærleika Jesusar.



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *13. Týsdagur* — *Matt. 5.27-48*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Nú vit við ársskiftið gera, sum Petur Háberg yrkir *Lít at teim farnu døgum*, NSGF 254, so var 2025 eitt gott ár andaliga, men strævið tímiliga. Paulus nevndi mangar trupulleikar í 2.Tim. 3.11, sum Harrin ikki hevði frelst *frá* ella *undan*, men *úr* ella *ígjøgnum*. Vit reisa tí Harranum eitt Eben-Ezer, *Higartil hevur Harrin hjálpt okkum!* 1.Sám.7.12.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Mikudagur* — *5. Mós. 13.1-18*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Vit fyrireika longu nú, nær summarlegurnar skulu vera og í hvørjari raðfylgju. Hetta gera vit í samráð við fólk í Føroyum. Meira kunning frá Filip Sivertsen á +299 263509 ella skriva til filipsivertsen@gmail.com

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Hósdagur* — *Matt. 6.1-34*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**
Vit eru Gudi takksom fyri allar signingar í 2025. Samkomuvøkstur, nýggj trúgvandi, dópar, nýggjan bygning og mangt annað. Stór er trúfesti Hansara!

## *16. Fríggjadagur* — *5. Mós. 14.1-29*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Vit takka hjartaliga fyri samfelagshond og stimbran í evangelisku tænastuni í 2025, sum fevndi serstøk evangeliseringsverk í Hirts-

hals, Rumenia og heima á landi. Vitjanartænasta liggur okkum nógv á hjarta. Vit eru til reiðar at koma á samkomuvitjan og at gera heimavitjanir eftir áheitan. Ring á 212045.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

*Í dag fyllir Hadassa Christiansen 15 ár

### *17. Leygardagur* — *5. Mós. 15.1-23*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Biðið um vísdóm í nýggja árinum at eggja og stuðla trúboðarum kring heimin, nú vit leggja ætlanir fyri tænastuna í 2026. Biðið, at yngsti sonur okkara Caleb skal venda sær aftur til Harran.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

### *18. Sunnudagur* — *Matt. 7.1-29*




**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**
Biðið, at vit fáa ein ella tveir elstar afturat í samkomuni. Sum er hevur Solomon bert ein elsta aftrat sær. Vit takka Harranum fyri vøksturin í

sunnudagsskúlanum, og at vit hava nóg nógvar sunnudagsskúlalærarar. Takk fyri trúfastan stuðul og bønir tykkara fyri okkum og samkomu Guds her og kring heimin.

## *19. Mánadagur* *5. Mós. 16.1-22*



**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**

Gott nýggjár! Takk fyri tað farna og fyri trúfesti í bøn. Vit eru takksom fyri toymið, sum gjørdi uppfylgingararbeiði og evangeliseraði í einum landsluti uttan fyri Istanbul. Tey høvdu fleiri góðar samtalur. Fleiri trúboðarar fáa nú endurnýggjað visum upp til eitt ár. Tað hevur ikki verið møguligt seinastu tíðina. Vit halda á við okkara arbeiði í Onglandi.

## *20. Týsdagur* *5. Mós. 17.1-20*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 2, Salome 2**

Tað var gott at luttaka á bíbliutýðingarverkstaðnum saman við tveimum av kovolmonnunum. Vit lærdu nógv um góðar mannagongdir, og eg (Philip) kundi byrja at týða 2. Mós. Steve Stanley arbeiðir longu við 1. Mós. Vit fara serliga at týða nøkur brot í GT, ið vísa til komandi frelsaran, Kristus. Tað er spennandi at geva teimum Guds Orð á teirra egna máli. Biðið um vísdóm og styrki, tí arbeiðið er umfatandi: bíbliutýðing, lesiskeið til undirvísing, og vit skulu skriva evangeliskar bíbliulestrar út frá týddu Skriftini.

## 21. Mikudagur — Matt. 8.1-34



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Takk fyri bønir og stuðul. Des. var sera hendingaríkur. Fongsulsvitjanin á jólum var heilt serlig. Undirtøkan var stór. Vit greiddu frá veruliga jólaboðskapinum, sungu saman, og allir fingu hvør sína bíbliu og kalendara. Biðið framhaldandi fyri nýggju samkomuni í Orvault, ymsu tænastunum, og at vit skulu vera áhaldandi í nýggja árinum. Vit ynskja tykkum eitt gott nýggjár.

## 22. Hósdagur — 5. Mós. 18.1-22



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit takka fyri framstig, sum Gud leiddi til í 2025. Biðið, at bíbliutýðingararbeiðið við einum av mixtec-málunum í Meksiko mennist alsamt. Takk fyri forbøn.

**MEKSIKO, Maravito**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna 0**

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

*Í dag fyllir Ewelina Mortensen 16 ár

## *23. Fríggjadagur* *5. Mós. 19.1-21*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 2**

Tað hevur gingið væl at læra mál og mentan. Nú byrjar næsta stigið. Biðið fyri okkum, sum vit fyrireika ferðina til Amerika og síðani til Føroya. Vit flúgva úr bygdini 29. jan. og koma til USA 12. feb. Vit verða í Føroyum frá 29. aug. og allan sept. Gleða okkum at síggja nógv tykkara.



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. Leygardagur* *Matt. 9.1-17*



**DANMARK, Hirtshals**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 16**

**Anna og Hans Djurhuus**

Einki føroyskt møti verður í januar. Vit ynskja øllum Harrans signing í nýggja árinum.

## *25. Sunnudagur* *Matt. 9.18-38*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg kom aftur til Tongia 12. des. Tey, sum lesa Skriftirnar, gleddust um at fáa Dóm. og 2. Sám., ið júst er prentað. Vit høvdu jólahugna

saman við teimum, ið koma til bíbliutímarnar. Vit tosaðu um, hví vit halda jól, lósu jólaevangeliið og fingu ein góðan drekkamunn. 1. Kong. skal rættlesast í feb., og eg skal gjøgnumganga Ezra, Neh. og 5. Mós. hjá unga umsetaranum. Hann arbeiðir í løtuni við 4. Mós. Biðið, at alt gongur væl.



## *26. Mánadagur* — *5. Mós. 20.1-20*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**

Vit eru takksom fyri, at vinir okkara Sólva og Klæmint Eliasen vitjaðu okkum í des. Vit fara til Guinea í vár at vitja aftur har, ið vit virkaðu í fleiri ár. Biðið fyri nýggju trúboðarunum, ið byrja at læra franskt, at teir byrja væl og falla væl til.

*Í dag fylla Salome og Manuel Hansen 2 ár

## *27. Týsdagur* — *5. Mós. 21.1-23*



**DANMARK**
**Susan og Øssur Berghamar**

Gjøgnum farna ár hava vit gleðst um tey mongu, ið trúliga hava leitað út í Kristnastovu og havt samfelag við okkum. Tað er eitt serligt bønarevni fyri nýggja árið, at Harrin vísir, hvørji kunnu hjálpa okkum at leiða arbeiðið víðari. Fleiri teirra, ið eru hollir stuðlar, fara væntandi heim aftur í 2026. Eisini eru tankar frammi um útbygging fyri at betra um umstøðurnar. Takk, um tit minnast hetta í bønum tykkara! berghamar@kristnastova.dk

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12,**
**Judah 10, Ethan 8**

## *28. Mikudagur* *Matt. 10.1-20*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**
Umsókn mín um varandi uppihaldsloyvi varð játtað herfyri. Tað merkir, at eg nú eisini kann vera burturstaddur í longri tíðarskeið. Vit hava nú í tveir mánaðir hildið enskmælt møtir í Betesda hvønn sunnudag seinnapart fyri útlendingar. Bíbliutímarnir eru grundaðir á *Firm Foundations*. Luttøkan er góð, og hjálparfólk eru tøk, eisini tónleikarar. Vit vóna eisini at byrja líknandi tiltøk aðrastaðni.

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

*Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 18 ár

## 29. Hósdagur — Matt. 10.21-42

**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**
Biðið fyri heilsuni hjá familju okkara og starvsfólkunum á *The Well International*. Noah er í viðgerð fyri snultara í eyganum.

## 30. Fríggjadagur — 5. Mós. 22.1-30

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 6**
Biðið fyri samkomuarbeiðinum í Agape Community Church. Annanhvønn hósd. hava vit bíbliutímar. Biðið, at hetta er til signing og uppbygging. Viðhvørt kemur ein, ið ikki er trúgvandi. Okkum tørvar vísdóm, hvussu vit skulu skipa hesa tænastu komandi ár.

*Í dag fyllir Tabita Christiansen 12 ár


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. Leygardagur* *5. Mós. 23.1-25*

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

### NÝGGJ BÓK!

**68 síður 60 kr.**

Orð Guds og bønin eru berandi súlur í lívi hins kristna. Samfelagið broytist nógv gjøgnum tíðirnar, men orð Guds er altíð nýtt og talar eisini inn í okkara tíð. Eitt vers í orði Guds er mangan júst tað, vit hava brúk fyri. At takka og biðja í navni Jesusar er knýtt til lyfti frá Jesusi sjálvum. Og hin andaligi sangurin nemur ofta við serstakar streingir í hjørtum okkara.




Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo